# Vilja skapa fleiri inntøkur í Suðuroy

**Tvørafólk ganga óvanligar leiðir fyri at økja um virksemi í Suðuroy, men um tað fer at eydnast er ein heilt annar spurningur**

FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hesi seinastu árini er streymurin av fremmandum ferðamannaskipum, sum eru komin til Havnar, alsamt øktur.

Men nú vilja suðuroyingar eisini sleppa upp í part.

Tvøroyrar Býráð er nú farin at kanna møguleikarnar fyri at fáa fremmand ferðamannaskip til Suðuroyar.

Fyrsta stigið í hesum kanningum er tikið.

Tað varð tikið, tá ið Chris Jan Michelsen, havnafúti á Tvøroyri, í farnu viku var á stórari ferðaskipa-stevnu í Miami í Florida í USA.



*Chris Jan Michelsen, havnafúti á Tvøroyri, hevur verið heilt í Miami í USA, har hann hevur tikið fyrsta stigið í royndini at lokka fremmand ferðamannaskip til Tvøroyrar*

Londini í Útnorðri, Føroyar, Ísland og Grønland, hava felags bás á hesi stevnuni og havnafútin á Tvøroyri var við í hesum básinum.

Á stevnuni bjóðaði hann Tvøroyrar Havn og Suðuroynna fram sum ferðamál hjá teimum stóru ferðamannaskipunum, sum á hvørjum sumri pløga atlantshavið her um okkara leiðir.

Umframt Tvøroyri, bjóðaði eisini Tórshavnar Havn seg fram og aðrar havnir vóru ikki umboðaðar.

Tórshavnar Havn hevur verið við í hesum í fleiri ár og har hevur tað sanniliga givið úrslit, tí har koma alsamt fleiri og fleiri ferðamannaskip hvørt summar. Og í ár fara fremmandu ferðamannaskipini, sum skulu leggja at í Havnini, kanska at nærkast teimum hálvthundrað, og tað er met.

### Fyrsta stigið

Men Chris Jan Michelsen ásannar, at hendan ferðin til USA kann einanas metast sum ein kanning og sum eitt fyrsta stig í royndunum at fáa ferðamannaskip hendavegin.

– Ferðin til Miami reisti nógv fleiri spurningar, enn hon gav svar, sigur hann.

Hann sigur, at tey, sum hava skil fyri slíkum, siga, at hetta er ein marknaður, sum tað tekur 5-10 ár at byggja upp, so tað verður ikki enn á sinnið, at vit kunnu vænta okkum ein ágóða av hesum – um tað eydnast yvirhøvur.

– Fyrst skal áhugin vekjast hjá teimum, sum eiga hesi skipini. síðani skal áhugin vekjast fyri Tvøroyri sum havn og síðani skal áhugin vekjast fyri Suðuroynni, sum ferðamál. Ikki fyrrenn tá, kann hugsast um at fáa nakran at leggja at her.

Hann sigur, at nú fer hann at skriva eina niðurstøðu av ferðini og í tí sambandi verður ein natúrligur spurningur um hetta yvirhøvur er nakað, sum tað ber til at arbeiða víðari við.

– Tað er ikki smáttarí, sum tað verður neyðugt at arbeiða víðari við og fáa í rættlag, áðrenn vit kunnu gera okkum vónir um at fáa nakað ferðamannaskip inn á Tvøroyri.

Men hann heldur, at hetta er ein møguleiki, sum avgjørt er verdur at kanna nærri.

– Eg haldi, at tað er avgjørt vert at brúka tað komandi árið til at hugsa seg um í og at royna at koma til nakrar niðurstøður.

Hann heldur, at hvat natúru, søgu og forvitnisligum plássum, viðvíkur er Suðuroy líka væl fyri sum nakar annar partur í landinum.

– Vit hava nógv at vísa fram, sigur hann.

Men hann sigur tað krevjast stórar fyrireikingar til at taka ímóti einum ferðamannaskipi.

– Bara tað at hava bussar til eini 400-500 fólk, ella kanska fleiri, er ein serlig avbjóðing hjá suðuroyingum í sær sjálvum.

– Tað ber ikki til at bjóða fleiri hundrað fólkum í land í Suðuroy av einum ferðamannaskipi og so vóna at tað ber til at fáa bussar til tey.

Tað er ikki væntandi, at nakar fer at útvega sær buss til at koyra við nakrar heilt fáar ferðir um árið, so her krevjast serligar loysnir, skal tað bera til, at útvega buss.

– Ein máti kann sjálvsagt vera at gera sáttmnála um at leiga bussar aðrastaðni frá, teir dagarnar, ferðamannaskip eru í Suðuroy.

– Tað, sum skal til, er rætt og slætt eitt slag av tilbúgving fyri, hvussu vit skulu taka ímóti einum slíkum ferðamannaskipi.

# Arbeiðskvinnur í Havn ongar trupulleikar av útlendingum

**– Trupulleikin, sum hevur stungið seg upp um útlendingar, sum arbeiða í Føroyum, vísir, hvussu neyðugt tað er, at vit yvirtaka útlendingamálið, sigur, forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag**

ÙTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

*– Summir útlendingar skulu ikki hava serlig rættindi at fara úr arbeiði til venjingar, um so er, at hetta ikki er ein rættur, sum føroysk arbeiðsfólk og aðrir útlendingar eisini hava, sigur Vígdis Johannesen.*



Í Havnini hava tey ikki so stórar trupuleikar av útlendskari arbeiðsmegi, sum tey siga, at tey hava aðrastaðni í landinum.

Í hvussu so er ikki arbeiðskvinnurnar í Havn.

Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at tey hava ikki merkt nakað til, at útlendingar hava tikið arbeiði frá føroyskum arbeiðarum.

Tó sigur hon, at støðan kann saktans verða øðrvísi kring um í landinum enn hon er í Havn, tí úti á bygdinum rúgvar tað nógv upp, tá ið nakrir útlendingar koma.

– Í áttatiárunum høvdu vit trupuleikar av útlendskari arbeiðsmegi. Men nú hava vit ikki merkt nakað til tað, ikki enn í hvussu so er.

Hon heldur, at tey fremmanda fólkini, sum eru í Havnar Arbeiðskvinnufelag, eru kvinnur, sum eru komin til Føroya at búgva, millum annað tí at tær hava funnið sær hjúnafelaga her.

– Vit hava altíð havt nakrar útlendingar á limalistanum, men tær eru ikki fleiri nú, enn tær hava verið í fleiri ár.

– Vit hava ikki havt tann trupulleikan, at føroyskir limir í Havnar Arbeiðskvinnufelag hava mist arbeiði, tí at útlendingar skuldu hava tað. Men, hvat vit gera, um tann støðan skuldi komið í, er ringt at siga.

### Størsta varsemi

Av tí, at hetta ikki hevur verið so stórur trupuleiki í Havn, hevur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki hugsað so nógv um spurningin.

Men hon heldur í hvussu so er, at spurningurin um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum er eitt mál, sum skal viðgerast við størsta varsemi.

– Vit skulu ansa okkum, áðrenn vit nokta útlendingum til Føroya, tí tá ið á stendur her heima, vilja føroyingar fegnir sleppa uttanlands at arbeiða og tað má vera báðar vegir.

Og vit mugu eisini ansa eftir, at vit ikki verða so fíggindalig ímóti útlendingum, sum vit hava sæð, at høgrekreftir í øðrum londum eru blivin.

– Men er tað so, at føroyingar missa arbeiði til frama fyri útlendingum, er støðan sjálvsagt ein onnur. Annars heldur hon, at spurningurin um útlendingar í Føroyum er eitt so eymt mál, at vit áttu at yvirtikið økið.

– So høvdu vit sjálvi alla ábyrgdina og so høvdu vit sjálvi fult tamarhald á, hvussu nógv og, hvør, kom til landið.

Og hon heldur eisini, at øll skulu vera líka fyri lógini. Eitt nú hevur verið ført fram, at útlendsk ítróttarfólk hava serlig rættindi at fara úr arbeiði til venjingar. Hetta dámar forkvinnuni í Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki.

– Summir útlendingar skulu ikki hava serlig rættindi at fara úr arbeiði til venjingar, um so er, at hetta ikki er ein rættur, sum føroysk arbeiðsfólk og aðrir útlendingar eisini hava. Øll skulu hava javnbjóðis rættindi, sigur Vígdis Johannesen.

## Øll nevndin heldur fram

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur havt aðalfund.

Og eftir aðalfundin er greitt, at øll nevndin heldur fram.

Vígdis Johannesen, forkvinna, stóð fyri vali, men onki annað uppskot um formann varð sett fram, so hon heldur fram uttan val.

Hinar, sum stóðu fyri vali, vóru Oda Dalfoss og Nina Dahl og tær vóru báðar afturvaldar.

Umframt Vígdis Johannesen sum formanni, hevur nevndin skipað seg við Odu Dalfoss sum næstformanni og Annie Benjaminsen sum skrivara.

Hinir nevndarlimirnir eru Nina Dahl og Annelisa Davidsen. Tiltakslimir eru Ethel Christiansen og Jónveig Arge. sum er nývald.



# Sølan av gomlu Norrönu komin undir land

**Gamla Norröna verður helst handað nýggjum eigarum um fáar vikur**

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenkov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Millum 5. og 16. apríl verður gamla Norröna handað nýggju eigarunum, væntar Jóannes á Váli, stjóri á Smyril Line*

– Vit eru komin ásamt við keyparan um høvuðstreytirnar, sum vit tó ikki fara at almannakunngera, sigur Jóannes á Váli, stjóri á Smyril Line.

Í Sosialinum týsdagin greiddi Óli Hammer, stjóri á Smyril Line frá, at eitt skipafelag við Miðarahavið var áhugað í at keypa gomlu Norrönu. Óli Hammer vísti eisini á, at hann trúði upp á tað hesaferð, tí keypararnir vóru rættu-liga ídnir eftir at fáa skipið.

Sluprísin vildi Óli Hammer ikki upplýsa – uttan tað, at hann liggur undir tí, sum Smyril Line helst vildi hava fyri skipið.

Í tíðidnaskrivi í gjár segði Jóannes á Váli, at sølusáttmálin møguliga varð undirskrivaður í gjár, men sambært Óla Hammer, stjóra, gongur tað neyvan so skjótt.

Um alt fellir upp á pláss, verður gamla Norröna væntandi handað nýggju eigarunum millum 5. og 16. apríl.

# Ljósið hevur fimleikaframsýning leygardagin

**Árliga fimleikaframsýningin hjá Ljósinum verður aftur í ár í tveimum umførum**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Fimleikaframsýningin hjá Ljósinum verður leygardagin 27. mars, har fimleikarar fara at sýna nakað av tí, ið er komið burtur úr í vetrarhálvuni.

Eftir væleydnaðu royndina í fjør at býta sýningina í tvey – ávikavíst børn og vaksin, hevur felagið avgjørt, at hetta verður mannagongdin í framtíðini.

Fyrsta framsýningin verður kl. 13, og er hon við børnum til og við 3. flokk, og seinna verður kl. 17 við 4. flokki og eldri. Ætlandi skal hvør sýningin ikki vara longur enn 1 1/2 til 2 tímar, tí annars gerst hon heldur marra enn uppliving fyri bæði íðkarar og áskoðarar – børnini gerast móð, og áskoðaraplássini eru ikki av júst chesterfieldslagnum.

Á báðum framsýningunum vera tó FM-lið í amboðsfimleiki og stórkappingarlið, ið øll vunnu heiðursmerki til stórkappingina herfyri. Hetta er lutvíst gjørt fyri, at íðkararnir skulu sleppa at royna seg framman fyri áskoðarafjøld og vísa tær seriur og brøgd, tey hava vant íðuliga í allan vetur, men eisini fyri at geva áskoðaranum eitt høvi at fáa innlit í munin á breidd og elitu og hvør menning kann fara fram frá barni til vaksin við miðvísari venjing, vilja og virkisfýsni.

### Framsýning í glámlýsi

Sum nakað nýtt, og kanska eisini við íblástri frá stórkappingini 2004, ætlar felagið at innramma framsýningargólvið við glæmunum frá ljósvarparum soleiðis, at fimleikararnir betur fáa hugsavnað seg um sína framførslu, og áskoðarin fær eina fagrari sjón fyri eyga. Vónandi verður hetta at ganga sum ætlað. Spennandi verður…

# Ølglaðir føroyingar

ØL
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, hóskvøld, verður fundur á Vertshúsinum í Havn, ið ætlandi skal føra til stovnan av einum ølfelag í Føroyum.

Á Restorffs Bryggjaríi siga tað, at »Danske ølentusiaster« er ein sera virkin felagsskapur í Danmark við umleið 9.000 limum. Felagið arbeiðir fyri at menna og fremja áhugan fyri dygdarøli, og fleiri limir eru í Føroyum.

Ætlanin er at stovna eina føroyska deild av hesum felag – væntandi á fundinum, sum verður í kvøld kl 20:30. Við á fundinum verða umboð fyri danska felagið.

Fyrireikararnir vóna, at nógvir øláhugaðir føroyingar møta.



NOA NOA®

Handilin er á tremur við nýggjum TONE BARKER silki

NOA NOA®

Opið er:
mán-hós 9-18
frí 9-19
ley 9-14

Hósmorgunin 23. mars lata vit upp hinumegin vegin, har vit selja restir av vetrarklæðum fyri botnprís. Indisk teppir og pútur frá "Diverse" fyri lágar prísir

Teppir 299,- (vanl 598,-)
Pútur 88,- (vanl 129,-)

Upplatingartilboð
Hósdag 25. apríl til Langan Leygardag 27. apríl
2 pútur 149,-

29 Í Tróndargøtu
tel 318200 • 218199